## Hagi skal venja Steaua



Størsa fótbóltsnavnið í rumensku søguni er uttan iva Gheorghe Hagi. Lágvaksni vinstrabeinti bóltsnillingurin fekk sítt gjøgnumbrot hjá Steaua Bukarest, har hann spældi sín seinasta dyst fyri 17 árum síðani. Nú er Hagi tó komin aftur í felagið sum venjari, sigur leiðslan í felagnum. Hagi hevur virkað sum venjari í Turkalandi, umframt at hann eisini eitt skifti var rumenskur landsliðsvenjari.

## 4. pláss til Katrin

Tað eydnaðist ikki hjá Katrin Olsen at vinna næstu world-cup stevnuna á árinum. Í Amsterdam róði hon saman við Sine Christiansen, og tær báðar gjørdust akkurát ov stuttar í heiðursmerkjastríðnum. Tær báðar gjørdust nevnliga nummar fýra.

VB/Sumba-NSÍ 1-2 (0-0):

# NSÍ einsamalt í oddinum

**Heimaliðið hevði uppiborið at fingið okkurt við sær av vøllinum í dag, men NSÍ vísti, hví teir eru oddalið og VB/Sumba botnlið**

FÓTBÓLTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*VB/Sumba fekk ikki armarnar nóg skjótt niður, og so revsaði innskifti Øssur Dalbúð, tá hann skoraði sigursmálið í Vági*
*savnsmynd*

Ein 2-1 sigur á útivølli móti botnliðinum. Tað var facit, nú runavíkingar fara norður um fjørð aftur.

Tað var annars ikki til at siga, hvat var oddur og hvat var botnur, tí lítil og eingin munur var á liðunum í fyrra hálvleiki. Heimaliðið fekk fyrsta møguleikan, tá Birgir Jørgensen var sera nær við, men ta ferðina eydnaðist ikki málslúkinum at umseta møguleika til mál.

Seinni hevði eisini Jón Krosslá ein møguleika, tá Óli Hansen var óskettin og traðkaði á bóltin. Men Jens Martin var tá so nær Jóni, at hesin ikki slapp framvið Landskrona-málverjannum.

Í hinum endanum hevði NSÍ eisini onkran næskan headara, men málleyst var, tá liðini fóru til hálvleiks.

Tað tóktist, sum VB/Sumba hevði rættiliga fingið trúnna upp á, at tað skuldi eydnast at fáa eitt gott úrslit, tí tað vóru teir, ið trýstu fyrstu longu løtuna av seinna hálvleiki. Men so beint móti leikgongdini skoraði NSÍ. Eftir hornaspark endaði bólturin hjá Einari Hansen, og hann langaði til millum vinir og fíggindar, og Vlada Filopovic var møguleikaleysur í málinum.

Heimaliðið gavst ikki, og tá hálvur tími var farin svaraðu teir aftur. Eitt fríspark úr høgru endaði við handaru stong, har Jákup Olsen headaði innfyri aftur til ein frían Birgir Jørgensen, sum lættliga kundi javnað.

Men gleðin var stokkutt, tí minuttin seinni slapp NSÍ lættliga ígjøgnum í høgru síðu, og innskifti Øssur Dalbúð møtti innlegginum, og so var 2-1. Harvið var tokið koyrt fyri heimaliðið, sum bert má sanna, at tað er tungt at vera botnlið.

## Næsti dystur telur mest

Venjarin hjá NSÍ er ein av royndastu monnunum innan føroyskan fótbólt. Og hóast felagið nú liggur einsamalt á odda, so fær hetta ikki Jóhan Nielsen at leypa uppfrá í ovfarakæti.

– Tað er ikki tað, sum vit hugsa mest um. Í fótbólti er tað altíð næsti dysturin, sum er týdningarmest, og soleiðis er tað eisini hjá okkum.

Kanska meira hesaferð, enn tað vanliga er, nú tit hitta EBS/treym?

– Ja, tað kanst tú gott siga, sigur Jóhan.

Spurdur, hvørt talan er um serliga uppskrift, nú NSÍ brádliga tykist vera meira enn líka við og næstan, sigur Jóhan, at tað er tað ikki.

– Fyrst og fremst, so eru vit enn bara nær við og næstan. Enn eru nógvir dystir eftir at spæla, so einki sum helst er avgjørt. Og um orsøkina haldi eg einamest, at tað hevur hjálpt okkum, at hini liðini í oddinum eisini hava verið so sera óstøðug. Vit skulu fyrst og fremst hugsa um at fáa betri glið á okkara spæl. Vit fáa so ikki gjørt av, hvat hini gera kortini, sigur hann.

**-mørk**

# Nú er tað undanbrekka hjá B68

**Eftir meiri enn hálvrunna kapping eru oddaliðini bæði tryggari í sessunum, enn tey higartil hava verið, og trýstið á KÍ í botninum er størri, enn tað higartil hevur verið**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Eftir vikuskiftið er kappingin meiri enn hálvrunnin. Tað skal vilja heilt undarliga til, um B68 ikki fer at hava vunnið sær pláss í Formula deildini, tá ið kappingin verður liðug síðsta vikuskiftið í oktober.

Í løtuni sær tað út til, at uppflytingin verður veruleiki í september, og um gongdin framvegis fer at verða, sum hon hevur verið seinastu vikurnar, so fer B68 at flyta upp fyrri enn so.

B68 var á Jóansøku á Tvøroyri, har toftamenn vunnu sannførandi 4-1 sigur. Jósup Henriksen og Alexandro Casthilio skoraðu málini í 1. hálvleiki. Næst við var TB, tá ið teir sendu í stólpan.

Beinanvegin eftir steðgin fekk TB brotsspark, men Gunnar á Steig bjargaði royndini hjá Daniel Nyarko til horna. Eftir hornasparkið støkk bólturin út um brotsteigin, og Jón Tórður Holm minkaði um munin við dundurskoti.

Vónin hjá TB um sigur og stig hvarv eftir ein tíma. Dánial Hansen økti til 3-1, og Øssur Hansen var tryggur, tá ið hann fekk møguleikan úr ellivu metrum.

Í vikuskiftinum lagaðu úrslitini seg soleiðis, at FSV04 eisini styrkti um sína støðu í kappingini fyri at flyta upp. Mikukvøldið átti FSV04 heimavøll ímóti sera ungum KÍ liði. Heimaliðið átti stóra yvirvág í spæli, men tað gekk striltið at spæla seg til møguleikar.

Stutt eftir steðgin tiltuskaði Andrzej Stretowicz sær brotsspark, sum hann umsetti til málið, ið bar øll stigini og harvið staðfesting av 2. plássi við sær.

At ÍF einki fekk við sær úr Leirvík varð sjálvandi væl fagnað í Sandavági. Fuglfirðingar megnaðu ongantíð at leggja trýst á. Leirvíkingar vóru eitt vet stinnari og skjótari í nærdystunum. Talan var ikki um nógvar málmøguleikar, og LÍF skoraði sigursmálið, tá ið 2. hálvleikur var fimm minuttir gamal. LÍF liðformaðurin, Magnus Skoralíð, sendi fríspark úr høgru í brotsteigin. ÍF málverjin hálvbjargaði, og miðvallarin Sølvi Vatnhamar var fyrstur á returinum og beindi bóltin í málið.

HB vann 6-3 á heimavølli ímóti NSÍ. Stóri maðurin í Gundadali var HB álopsspælarin Tróndur Sigurðsson. Unglingaspælarin skoraði fimm av seks HB málum, og hann legði upp til málið, sum Bárður Mittelstein skoraði.

Stóri munurin á liðunum báðum var, at bestu NSÍ unglingarnir, sum plaga at hjálpa næstbesta liðnum, vóru í Vági við Formula liðnum. Hjá HB vóru Formula unglingarnir við. Eitt nú Pætur Jørgensen og Ólavur í Ólavsstovu.

Sigurin bar við sær, at HB fekk luft í kappingini fyri at sleppa undan plássunum undir strikuni. Trýstið á KÍ gjørdist uppaftur størri, tí sørvingar vunnu, tá ið teir vitjaðu botnliðið B36

Einasta málið skoraði Jens Erik Rasmussen í fyrsta minuttinum eftir steðgin. Eftir innlegg úr høgru smekkaði veteranurin bóltin millum beinini á mótstøðumanni og í málið.

B36 royndi at leggja trýst á síðstu løtuna. Næst við at skora vóru teir, tá ið verjuspælarin Bárður H. Joensen eftir horna stútaði dygst framvið.

Øll liðini hava nú spælt 14 dystir uttan HB og ÍF. Nú mikukvøldið verður uppgerðin teirra millum í Gundadali. Leygardagin verður 15. umfar: B68-HB, ÍF-TB, KÍ-B36, NSÍ-FSV04 og SÍ-LÍF.